














# Nýggi fiskimálaráðharrin má byrja av nýggjum

**– Størsta uppgávan hjá Jacob Vestergaard verður at endurreisa álitið á fiskidagaskipanina, tí álitið er við at fara fyri bakka og tað er tað ringasta, sum kann hendan, sigur Henrik Old, formaður í vinnunevndini**

FISKIDAGASKIPAN Í FRÍUM FALLI

*Áki Bertholdsen*

Vit hava nýliga fingið nýggjan landsstýrismann í fiskivinnumálum.

Og Henrik Old, sum er formaður í vinnunevndini hjá Løgtinginum, heldur, at størsta avbjóðingin hjá Jacob Vestergaard, verður júst at byrja av nýggjum.

– Fremsta avbjóðingin hjá nýggja landsstýrismanninum í fiskivinnumálum verður at endurreisa álitið á fiskidagaskipanina.

Formaðurin í vinnunevndini sigur, at seinastu tíðina er so nógv álit máað undan fiskidagaskipanini, at tað kann koma at seta alla skipanina í vanda.

– Og tað er júst politiski myndugleikin, sum hevur ábyrgdina av hesum og tí er einasta bjargingin hjá fiskidagaskipanini, at nýggi landsstýrismaðurin tekur betri partar fyri seg og leggur umsitingina á annan bógv.

## Forpliktar

Tað, sum formaðurin í vinnunevndini sipar til, eru øll tey umstríddu málini sum hava verið um at leggja fiskiloyvi saman, har loyvini hjá smærru skipum eru løgd saman til stór skip.

– Hendan mannagongdin, sum umsitingin í Fiskimálaráðnum hevur brúkt í hesum førunum er við at máa álitið undan fiskidagaskipanini og tað er ein vanlukka.

– Fiskidagaskipanin kann bert virka, tá ið vinnan hevur álit á skipanini og sostatt eisini góðtekur skipanina. Styrkin í fiskidagaskipanini er, at øll vinnan hevur góðtikið hana.

Hann sigur, at fiskidagaskipanin er ein góð skipan.

– Men tað forpliktar. Tað forpliktar okkum at ansa væl eftir henni.

Og tað er í hesum sambandi, at Henrik Old sigur at politiska valdið hevur svikið.

Hann heldur, at við teimum samanleggingum, og øðrum, sum landsstýrið hevur loyvt í seinastuni, er álitið á skipanina við at fara fyri bakka.

Tá ið vinnan sjálv talar so harðliga at, soleiðis sum felagið línuskip hevur gjørt í seinastuni, sigur tað honum so mikið sum tað, at skipanin fullkomiliga er við at fara út á eitt skeivt spor og át álitið á skipanina er við at vera fokið.

## Tambað út á mark

Hann sigur, at tað er onki ónatúrligt í at vinnulívsmenn spekulera og alsamt royna at fáa sum mest burturúr.

– Men tað má vera uppgávan hjá umsitingini í Fiskimálaráðnum at syrgja fyri, at vinnulívsmenn ikki sleppa út um mark. Tað er uppgávan hjá Fiskimálaráðnum at útinna lógina soleiðis at øll hava álit á henni. Men tíverri er tað hent, at saman við vinnulívsfólkunum, hevur politiska umsitingin víst stórt hugflog til at tamba skipanina ut á ytsta mark, og í veruleikanum útum tað, sum tey flestu halda vera endamálið við henni.

Hetta hevur somuleiðis ført við sær, at tað sundurbýtið av Føroysagrunninum ímillum ymsar veiðihættir, sum vinnan hevur góðtikið, eisini er við at skaklast av kós.

– Tað, sum Fiskimálastýrið hevur givið loyvi til, hevur ført við sær, at veiðitrýst er flutt ímillum bólkar, so at býtið ímillum bólkarnar verður skeivt og ikki er í samsvari við tað, sum ætlanin við lógini var.

– Táið lógin verður tambað, sum hon er blivin í seinastuni, er eisini stórur vandi fyri, at øll ikki verða eins fyri lógini og munur verður á, hvussu ymsir vinnulívsmenn verða viðfarnir. Og tað fer at skapa enn størri ónøgd, tí tað ber ikki til at loyva summum vinnulívsmonnum eitt, men at nokta tí næsta.

Henrik Old sigur, at tað, sum hevur størstan týdningin er, at politiska umsitingin fær vinnununa at taka lut í arbeiðnum at varðveita fiskidagaskipanina.

– Tað er ómetaliga týdningarmikið, at fáa fulla semju um, at fiskidagaskipanin skal varðveitast.Men tað fáa vit ikki, uttan at vinnan sjálv hevur ein virknan leiklut í hesum arbeiðnum, og tað hevur hon bara so leingi, sum hon hevur fult álit á skipanini.

Henrik Old heldur, at júst tær minguleringar, sum eru gjørdar í seinastuni, eru við til at máa álitið undan skipanini.

– Tað, sum er hent, er, at summir partar av vinnuni føla, at fiskidagaskipanin verður ikki umistin á lógligan hátt og tað er beinleiðis at bróta skipanina niður aftur.

Henrik Old sigur, at tað, sum er farið fram seinastu tíðina hevur ført við sær, at veiðitrýstið er økt.

– Og tað fer at føra við sær, at onnur, sum ganga eftir skipanini, verða skerd í fiskidøgum, og tað skapar mótstøðu.

Formaðurin í vinnunevndini sigur, at skal fiskidagaskipanin yvirlivað, má umsitingin í Fiskimálaráðnum tískil beinast aftur á rætt.

– Nú hava vit fingið nýggjan landsstýrismann í fiskivinnumálum og tað er bara at vóna at hann tekur betri partar fyri seg og byrjar av nýggjum, so at skipanin fæst aftur á beint.

– Eg haldi, at nýggi landsstýrismaðurin eigur at gera greitt at ongi mál verða avgreidd, sum eru ivingarsom, fyrrenn full greiða er fingin á øllum viðurskiftum.

– So gerst ikki við, at onkur kemur at bíða nakað leingi eftir at fáa sínar umsóknir avgreiddar. Men at fáa fiskidagfaskipanina aftur á beint og at endurreisa álitið á skipanina aftur er tað týdningarmiklasta av øllum, heldur Henrik Old.

At landsstýrismaðurin nú hevur sett nakrar kunngerðir í gildi, heldur hann ikki broytir støðuna nakað serligt.

– Eg veit ikki, hví tað hevði slíkan skund at gera tað beint nú. Og eg veit heldur ikki, hví tað skuldi gerast í sjálvdrátti, uttan at nakra sum helst viðgerð, so tað bøtir heldur ikki um, leggur hann afturat.



*– Nú mugu vit taka okkum um reigggj so at vit ikki forkoma fiskidagaskipanini, heldur Henrik Old, formaður í vinnunevndini hjá Løgtinginum*